Lýsingartorgið

Lýsingatreytir fyri ókeypis lýsingar:
✓ privatar lýsingar
✓ í mesta lagi 40 orð
✓ bert ein lutur í hvørjari lýsing
✓ hægsta søluvirði 20.000 kr.

Lýsingar, gjaldast skal fyri:
Vanl. lýsingaprísur:
✓ frá fyritøkum og virkjum
✓ fleiri enn 40 orð
✓ søluvirði oman fyri 20.000 kr.

tó minst 50,- kr. + MVG hvørja ferð:
Lýsingar, gjaldast skal fyri:
50,- kr. + MVG hvørja ferð:
✓ lýsingar undir teigunum: »Dansur«, »Fundir« og »Matur«
✓ Bill. merktar

Akfør

AUDI 100
árg. 87, koyrt 202.000 km, heilgalvaniseraður (rustar ikki), sýnaður 10/99, til søluvi fyri uml. 15.000 kr.
Tlf. 313701 og spyr eftir Christian

AUDI 80 1.8S
árg. 88, heilgalvaniseraður, hevur sóltak, servostýring, radio og alu felgur. Kostnaður 65.000 kr.
Tlf. 218778

BILUR TIL SØLU
Citroën BX16, myrkagrønur, nýrustviðgjørdur og nýsýnaður, bíliga til søluvi.
Tlf. 333174 - 212174

BMW FELGUR
Orginalar 16" BMW felgur seljast. Felgurnar eru bert 1 ára gamlar við nýggjum Continental 205/55-R16 dekkum.
Tlf 211800

CARINA E 2.0 DIESEL
árg. 5/96, heillakeraður mai 2000, sýnaður 12/99, koyrt 174.000 km, og koyrt sum skúlavognur 163000 km, til søluvi fyri kr. 115.000.
Tlf. 319961 eftir kl. 18

CITROËN DIESEL
BX 1,9 turbo, árg. 11/88, koyrir 17 km/ltr., hevur nýumvældan motor, nýggja turbo, útstoyt, bremsur o.a. + el-rútar, servostýring og sentrallás, til søluvi fyri 29.000 kr. ella hægsta boð yvir.
Tlf. 212055

CITROËN XANTIA
Turbo diesel, árg. 7/98, 48.000 km, við 16" alu. felgum, til søluvi fyri 165.000 kr.
Tlf. 211990

DAEWOO LANOS
Ein 1 ára gamal grønur Daewoo Lanos til søluvi, er frá mai 1999. Hevur bert koyrt 3.200 km, er sera vælhildin og er sum nýggjur.
Tlf. 217847 ella 317847

DATSUN STANZA
árg. 82, uttan plátur, aut. gear til søluvi sum eykalutir.
Tlf. 457895

DYNAMO
Ein dynamo til Honda Accord árg. 87 ynskist til keyps.
Ring á tlf. 212462 ella 422462 eftir kl. 19

EYKALUTIR
til Daihatsu Charmant bíliga til søluvi.
Tlf. 213577

FELGUR
við góðum dekkum, 155/70/13, til ein VW Golf, árg. 88, bíliga til søluvi.
Tlf. 320294, e. kl. 18

FERRARI GR 2300 S
krani til søluvi.
Tlf. 449045 ella 283753 e. kl. 17

FORD COURIER 1.8D
vøruvognur til søluvi, árg. 95, prísuppskot: kr. 35.000,-
Tlf. 451101 ella 455840

FORD ESCORT
14 CL til søluvi, bæði sproytaður og sýnaður í 1999, koyrt 142.000 km, kr. 11.000.
Tlf. 441891 ella 211841

FORD ESCORT 1.6
sedan, árg. 87-88, sýnaður 5/2000, ongan kross, til søluvi fyri 14.000 kr. ella gev eitt boð.
Tlf. 314425

FORD FIESTA
árg. 87 til søluvi fyri sámuligan prís. Píkadekk fylgja við.
Tlf. 319529 aftaná kl. 19

FORD FIESTA 1.8
diesel, árg. 94, 2 hurðar, til søluvi fyri 57.000 kr.
Tlf. 214413

FORD FIESTA GHIA
árg. 85 til søluvi. Sýnaður á heysti 99. Koyrt 98.000 km.
Tlf. 310574

FORD MONDEO
1.8 TD til søluvi. Hevur sóltak, el-rútar, powerstýring.
Tlf. 451024

FORD ORION 1.8 D
ynskist til reservalutir ella Escort fyri ca. 1.000-3.000 kr.
Tlf. 423572 ella 210560

HONDA ACCORD
Honda Accord 1.8 i, árg. 98, koyrt 100.000 km, við 15" felgum og Pioneer cd við boks, er sum nýggjur til søluvi.
Tlf. 319674

HONDA ACCORD
árg. 87, lakeraður fyri hálvum ári síðani, hevur Azev sportsfelgur, vel, powerstýring, sentrallás og el-rútar, til søluvi.
Tlf. 281926 - 441863

HONDA CIVIC 1.8 VTI
árg. 12/98, koyrt 55.000 km, áhugaði kunnu ringja
tlf. 421381 ella 218302

JEEPUR
Mitsubishi Pajero, 4 hjólstrektur, turbo diesel, 7 sitipláss, árg. 86, koyrt 167.000 km, til søluvi fyri uml. 20.000 kr.
Tlf. 317676

KAMPINGÚTSTÝR TIL SØLU
t.d. komfýrur, køliskáp, wc, vask, skáp. Ger tín egna kampingbuss, í summarhús ella í bát 3000 kr.
tlf. 423572 ella 210560

KAMPINGVOGNUR
Sprite Alpine til søluvi, køliskáp og gasskomfýrur er í honum.
Tlf. 312604 ella 212504

LANDROVER
110 turbo diesel, til søluvi.
Tlf. 328081

MAZDA 323
árg. 88, til søluvi. Bilurin er sýnaður, í bilinum er cd-spælari v/joystick + 2 160 w hátalarar, eyka sett av felgum við heilársdekkum fylgir við.
Tlf. 212415

MAZDA 323
árg. 85 til søluvi vegna flyting. Sýnaður í januar 2000. Er í góðum standi. Prísur min. 8.000 kr.
Tlf. 221901 ella 319021

MAZDA 323 1.3
árg. 88, við skaða, til søluvi fyri 8.000 kr. Koyrt 155.000 km. og koyrir væl.
Tlf. 313409

MAZDA 626
árg. 87, í góðum standi, til søluvi.
Tlf. 423073 - 220653

MAZDA 626
árg. 91, til søluvi. Koyrt 95.000 km. Sýnaður í mars 2000.
Tlf. 314111, e. kl. 17

MC-BOOGIE
Í samb. við vitjan úr Íslandi skipar Føroya Ellisakfør fyri mc-boogie leygardagin tann 27.mai. Tiltakið er alment og byrjar kl. 11.00 úr hølum felagsins yviri v. Strond 22. M.a. verður felagskoyring og „biker-party“.
Føroya Ellisakfør

MITSUBISHI CANTER
lastbilur, 6 tons, árg. 88, bíliga til søluvi.
Tlf. 287622

NISSAN MICRA
1.0 frá 1984, 200.000 km til søluvi fyri 2.500 kr. koyrir væl, men Bilsýnið krevur ymiskar ábøtur framdar.
Tlf. 332858 eftir kl. 19

NISSAN PATROL
3.3. turbo diesel til søluvi fyri 20.000 kr.
Tlf. 222101

OPEL CORSA
árg. 12/86, til søluvi sum eykalutir fyri 2.500 kr. Hevur plátur.
Tlf. 441040

OPEL CORSA 1.4
16V vælhildin við 4 hurðum, alufelgum bíliga til søluvi, árg. 11/96, koyrt 41.000 km.
Tlf. 310161 ella 211161

OPEL MANTA
14 ára gamal Opel Manta til søluvi.
Tlf. 375380

PEUGEOT 106
Peugeot 106, 4 hurðar, til søluvi um hóskandi boð fæst.
Tlf. 332848

PEUGEOT 205 XS
árg. 88 í góðum standi, til søluvi fyri 20.000 kr.
Tlf. 314569

SERA BÍLIGA TIL SØLU
Gamal VW Polo, kann brúkast til eykalutir, sera bíliga til søluvi. Hevur hampuliga góð dekk.
Tlf. 310989, e. kl. 19

SPORTFELGIR
ynskjast fyri 2.000 kr. 10 cm. millum hol.
Tlf. 423572 ella 210560

SPORTFELGUR
Fýra sportfelgur til søluvi, 5 hol, 195/15/50 fyri kr. 3.500,-
Tlf. 211525

SPORTFELGUR
Fýra sportfelgur 205/50 R15 til søluvi um hóskandi boð fæst + eitt sett av hátalarum av slagnum Pioneer TS-2150.
Tlf. 221584

SPORTSFELGUR
Einar 16" sportsfelgur til søluvi fyri 4.000 kr. Passa til Opel og VW.
Tlf. 372090 - 212090

SUBARU 1.6
coupe, árg. 86, koyrt 139.000 km, til søluvi fyri 5.000 kr.
Tlf. 316236

SUZUKI
SJ 413 jeepur, árg. 87, selist sum eykalutir, koyrir enn.
Tlf. 314616

SAAB 99
v/skaða. Bilurin hevur góðan motor, 4 eyka felgur við góðum píkadekkum og nýggjan sleipikrók. Vælegnaður til eykalutir. Bíliga til søluvi.
Tlf. 361265 eftir kl. 18

TIL HONDA ACCORD
typ SY árg. 83. Motorur Typ EL 1602 ccm við gearkassa og drívakslum. Áhugaði ringið
tlf. 421364 ella 222535

TIL SØLUVI
Toyota Corolla 2.0 diesel vøruvognur, árg. 97, 89.000 km, sær út sum fyrsta dagin.
Tlf. 455340 - 215340

TIL SØLUVI
Ford Sierra 1,6 frá 1986 við brotnum gearkassa til søluvi, møguliga sum eykalutir. Sær gott út og gongur væl. Hevur koyrt um 200.000 km.
Tlf. 31 31 33

TIL SØLUVI
Opel Corsa, árg. 86, góður sum eykalutir: 4 dekk 13 x145, baklúka, bensintangi, kølari, motorur, síðuspegl. Bilurin kann koyra.
Tlf. 333498

TIL SØLUVI
Daihatsu Rocky Turbo til søluvi fyri 6000 kr. Árg. 88 Hevur plátur.
Tlf. 210737

TOYOTA CARINA E
2000 GLI, í sera góðum standi, til søluvi.
Tlf. 222016

TOYOTA CARINA II
árg. 1985 til søluvi fyri kr. 5.000,- ella hægsta boð yvir. Hevur spildurnýggj dekk.
Tlf. 312323

TOYOTA HiACE
minibussur, árg. 86 til søluvi. Hevur dieselmotor.
Tlf. 221503

TRAKTORUR TIL SØLUVI
Universal, árg. 97. Áhugaði kunnu ringja.
Tlf. 421021

YNSKIST
Lítið brúkt dekk ynskjast bíliga til keyps. Stødd 205-50-16.
Tlf. 372090 - 212090

Amboð

RENNIGRAVARI
ynskist til keyps fyri uml. 20-50.000 kr. í hampuliga góðum standi.
Tlf. 317676

TIL SØLUVI
Fýra sportsfelgur av slagnum WSL 5 egern við summardekkum 195/50-15, passa til Toyota, til søluvi fyri 2.500 kr.
Tlf. 310962
ella 210962

Arbeiði

ARBEIÐI SØKIST
Tveir raskir, 19 ára gamlir menn søkja eftir arbeiði í summarfrítíðini, 15. juni–15. aug. Annar er føroyingur, hin er svii. Alt hevur áhuga.
Tlf. 0046 650 21 700

AU-PAIR SØGES I DK
Vi er en ung og engageret familie på landet, som ønsker en selvstændig og ansvarlig au-pair til hushjælp og pasning af spædbarn i samråd med os. Ring og fá en snak med os, på tlf. 74716148

ER TAÐ NØKUR
dama, sum hevði havt hug at til at passa eitt heim! So vinarliga ring og hoyr meiri.
Tlf. 0045 40935530

MÁLING AV TEKJUM
Eg máli tekju tygara skjótt og vel. Koyri kring landið.
Tlf. 332005, e. kl. 18

TILBOÐ YNSKIST
uppá at stoypa garð og trappu skjótast gjørligt.
Tlf. 316992, e. kl. 17

Barnaútgerð

BARNAVOGNUR
2 ára gamal Brio vognur til søluvi fyri 2.500 kr. Sera væl viðfarin. Brúnur/ternutur við brúnum stelli.
Tlf. 375300

BRÚKTUR BARNAVOGNUR
kann gerast til stól. Bert brúktur til eitt barn, bíliga til søluvi.
Ring 422147

MYRKABLÁUR
barnavognur við lift, tasku, regnslag og flugunet til søluvi fyri 1300 kr, lítið brúktur.
Tlf. 317775

RÁHVÍTUR
Brio barnavognur saman við regnslagi til søluvi fyri 500 kr.
Tlf. 443315

REGNTÆTTUR
stórur barnavognur við babylift til søluvi. Bert brúkt til eitt barn.
Tlf. 310836

TIL SØLUVI
Ein myrkabláur »Exclusive Classic« Simo vognur við fluguneti, regnslagi, madrassu, pútu, dýnu og eini penari Simo tasko til, til søluvi.
Tlf. 456667
ella 220499

Lýsingar tekstur

Lýsingin ynskist: 1 2 3 4 5 ferðir *(set X)*
undir teiginum:

❑ Akfør	❑ Amboð	❑ Arbeiði
❑ Barnaansing	❑ Barnaútgerð	❑ Bátaútgerð
❑ Bingo	❑ Bræváskifti	❑ Burturm./funnið
❑ Býli	❑ Bøkur	❑ Dansur
❑ Dýr	❑ Fundir	❑ Húsarhaldstól
❑ Innbúgv	❑ Lutaseðlar	❑ Leikur
❑ Matur	❑ Pløgg	❑ Samband
❑ Súklur	❑ Teldur	❑ Tónleikur
❑ Út- & sjónvarp	❑ Ymiskt	❑ ……

Lýsingarnar skulu vera okkum í hendi innan kl. 12.00. T.v.s. at lýsing til leygardagsblaðið skal vera okkum í hendi hósdag á middegi

Sent hevur:

Navn: ……

Bústaður: ……

Bygd/býur: ……

Tlf.: ……

»Lýsingartorgið«
Tíðindablaðið
Sosialurin
Box 76,
110 Tórshavn

Til frímerki

TIL SØLU
Barnavognur við lift, dýnu og koda, regnslagi og tasku til søluvi fyri 1.600 kr.
Tlf. 441280

TIL SØLUVI
Bilstólur, Britax (Rock-a-Tot), kann berast, stødd 0-15 mðr. (uml. 13 kg). Sera vælhildin. Til søluvi fyri 500 kr.
Tlf. 319510, e. kl. 17

TIL SØLU
Gráur Brio leðurlook barnavognur við lift bíliga til søluvi.
Tlf. 316181, e. kl. 17

Barnaansing

HEY!
Eg søki eina álítandi kvinnu at ansa eftir 3 ára gamla soni mínum frá kl. 8-14.
Ring 313976

Bátaútgerð

4-MANNAFAR
Eldri føroyskt bygt 4-mannafar, við slúsu til leysamotor, til søluvi.
Tlf. 373379 eftir kl. 18

AVHEINTINGARTILBOÐ
Speedbátur, 15 fót, siglir ca. 30 míl, 40 HK Mariner, el-start, VHF, tveir bensintangar, kumpass o.a. Á vogni. Til søluvi fyri 19.000 kr. ella boð yvir.
Tlf. 319567

BOTNMÁLING FRÁ HEMPELS TIL BÁTAR
Botnmáling í 26 litra spannum bíliga til søluvi. Kann sendast um alt landið.
Tlf. 213536

SEKSMANNAFAR TIL SØLU
Føroyskt bygt seksmannafar til søluvi.
Tlf. 371563, fax 372563

TIL SØLU
Vælútgjørdur Star Let 28 fótur glastrevjabátur til søluvi.
Tlf. 316181, e. kl. 17

YNSKIST
Eitt lítið línuspæl ynskist til keyps. Vinarliga ring til
Tlf. 284809 - 312559

YNSKIST
VHF sendari ynskist til keyps fyri sámuligan prís.
Tlf. 315661

Bingo

BINGO
Gott bingo verður í TB-húsinum leygardagin 27. mai kl. 17. Høvuðsvinningur á lutaseðli 2 x 500 kr. Annaðhvørt bingo 300 kr. og annaðhvørt 1/2 krov.
Tvøroyrar Bóltfelag

BINGO
til frama fyri Norðoya Vanlukku Grunn verður í Skálanum hósdagin 1. juni kl. 19.30. Til ber at lata vinningar í Skálanum mikudagin 31. mai frá kl. 17-22. Grunnurin takkar fyri allan stuðul.
NVG

GOTT BINGO
verður í VB-húsinum onsdagin 31.5 kl. 19.30. Nógvir góðir vinningar.
Vágs Billiardfelag

GOTT BINGO
verður í Eydnuni Kristi himmalsferðardag 1. juni kl. 16. Full pláta 400 kr. 6. og 12. spæl 600 kr. Á lutaseðli gávukort á 2.000 kr. frá Smyril Line. Drigið verður millum spølini.
Sunda Róðrarfelag
og Flogbóltsfelagið Nøvan

KAGGIN!
Gott bingo verður sunnukvøldið 4.6. kl. 19.30. Burturlutað verða m.a. tvey lomb í heyst.
Kaggin

SEINASTA BINGO
áðrenn summarsteðgin verður í Havnar klubba mánakvøldið 29. mai kl. 19. Áðruhvørja ferð fulla plátu turt tjógv/íslandskt krov. Høvuðsvinningur á lutaseðli Apex flogferð. Ókeypis kaffi. 15 plátur 100 kr. Koyring heim.
Føroya Astma- Allergifelag

STUÐLAFELAGIÐ GLOTTIN
hevur gott bingo í Páll-stovu í dag, leygardagin kl. 15. Full pláta 400,- + síðuvinningar. Drigið millum spølini 15 vinningar á lutaseðlunum, m.a. 5 gávukort á 1.000,- 15 plátir 100 kr. Koyring heim, eykaspæl.
Stuðlafelagið Glottin

SUÐUROYINGAR!
Gott bingo verður í skótahúsinum í Vági onskvøldið 7. juni kl. 19.30. Annað hvørt bingo kr. 300, og annað hvørt gávukort á 1/2 krov. Ein harmonikuferð verður burturlutað
Kirkjukórið Ljómur

Burturm. / funnið

ÍBÚÐ SØKIST
Ungt, friðarlig par søkir eftir íbúð ella lítlum húsi til leigu á leiðini millum Oyrarbakka og Hvalvík.
Tlf. 221676, e. kl. 18

ÆR HORVIN
av Landavegnum í Havn. Hvít og hálsasvørt. Merkt: hálvt frá horn - bragd aftan høgra oyra, gult chips í vinstra oyra. Um nakar veit um hana, ring
Tlf. 315352
Chr. Christiansen

Býli

2 VER. ÍBÚÐ
í Keypmannahavn til leigu í tíðarskeiðnum 1. juli-1. september. Liggur sera centralt, bert 10 min. til gongu til Strøget, Høvedbanegården, Tivoli v.m. Íbúðin hevur allar hent-leikar, køk, vw v/bað, kamar, stovu við sjónvarpi o.ø. Gott bussamband. Kostnaður kr. 1.500 pr. viku.
Tlf. 0045 32961082

EINI HÚS
í Skálavík til leigu í vikuskiftunum. Gott útsýnið.
Tlf. 361217

FERÐIST Í SANDOYNNI
Gisti á Mýruni í Húsavík. Vanligir hentleikar, t.d. brúsa. Sera vakurt útsýni. Bilin til dyrnar.
Tlf. 318037

FERIETUR TIL GÖTEBORG?
Norsk dame leier ut sin leilighet til turister. Gjerne fra Færøyene. Nær Liseberg. 1.000 SEK/uke eller 400 SEK/døgn.
Britt Pedersen, tlf. 0046 31272804
Opplysn. tlf. 315808
(Beinta Nattestad)

GJÓGV - VIKUSKIFTI/ FERIU
Hevur tú hug at uppliva ta vøkru náttúruna við Gjógv. Vit leiga út eitt sera hugnaligt frítíðarhús við vanligum hentleikum.
Tlf. 423138, 313423, 316505 ella 284705

ÍBÚÐ TIL SØLU
Íbúð »Undir Fjalli« til søluvi.
Tlf. 216148

HÚS ELLA ÍBÚÐ
ynskist í Eysturoynni ella í Streymoynni, fyri sámuligan prís.
Vinarliga ring 457095

HÚS Í HAVN YNSKJAST
til leigu í minsta lagi í tvey ár í barnavinarligum og grønum umhvørvi. Møguligt keyp kann koma upp á tal.
Tlf. 455139

HÚS Í HJØRRING
til leigu í tíðarskeiðnum 15. juli til 5. aug. Húsini eru vælegnað til tvær familjur, 10 min. at koyra til strondina.
Tlf. 0045 98928957 ella tlf. 314166 eftir kl. 17

HÚS Í TRONGISVÁGI
Um hóskandi boð fæst, eru eini sethús í Trongisvági til søluvi.
Tlf. 315437
ella 321803

HÚS TIL SØLUVI
Um hóskandi boð fæst eru hús og tilhoyrandi úthús í Tórsbyrgi 2 til søluvi. Húsini eru 73 m2 í einari hædd, og úthúsið er 13 m2, í húsunum eru stova, køkur, sovikamar, kamar, wc-bað, durur og gongd. Áhugað kunnu ringja.
Tlf. 314607 ella 220019

HÚS/ÍBÚÐ
Tilkomin hjún ynskja íbúð, hús til leigu í Tórshavnar kommunu skjótast. Av tí at støðan er »akut«, hevur næstan alt áhuga. Ganga friðaliga og fara væl um í allar mátar.
Tlf. 318401 ella 447067

ÍBÚÐ
ella kamar ynskist í Århus til eina unga gentu, sum er í læru.
Tlf. 371766

ÍBUÐ Í KEYPMANNAHAVN
Einastandandi bílig, 2-rúms andeilsíbúð í Keypmannahavn er til taks, um gott gerabýti kann gerast í Føroyum. Íbúðin hevur stovu, kamar, baðirúm/wc og køk. Bygningurin hevur bíligan fjarhita, termorútar, hybridnet og felags vaskarí. 50 metrar til bussar, 300 metrar til S-tok og bert 12 min. frá miðbýnum. Nær við Universitetsparken, Ríkissjúkrahúsið, Panum og Fælledparken og stutt til handlar, bankar og innkeypssentur.
Bill.mrk. 018840

ÍBÚÐ Í KEYPMANNAHAVN
til framleigu fyri íbúð ella hús í Havn. Er onkur, ið hevur hug at býta um við okkum í 1 ella 2 ár frá 1. august ella eftir nærri avtalu. Vit hava: 100 kvm. (3 rúm) við øllum hentleikum, í Børnshøj í friðarligum og grønum umhvørvi, við útsýni yvir alt Keypmannahavn.
Tlf. 038 284216
e-mail:
dagmar@post.cybercity.dk

ÍBÚÐ SØKIST
Ungt, friðarligt par søkir íbúð ella lítil hús til leigu á leiðini millum Oyrabakka og Hvalvík.
Tlf. 221676, e. kl. 18

ÍBÚÐ SØKIST
Ungt par við einum barni søkir íbúð í Havn ella nærhendis. Fara væl um, roykja og drekka ikki.
Tlf. 328141 Arna

ÍBÚÐ YNSKIST
24 ára gamal friðarligur ikki roykjari ynskir íbúð í Havn fyri uml. 2.000 kr. um mðr. ella minni. Hevur fasta inntøku.
Tlf. 441283

ÍBÚÐ YNSKIST
Ungur maður søkir íbúð í Havn. Havi fast arbeiði, royki og drekki ikki.
Ring 328022 eftir kl. 18

ÍBÚÐ YNSKIST!
Friðarligt par úr Suðuroynni søkir íbúð í Havn, Hoyvík ella Argjum. Fara væl um roykja ikki.
Vinarliga ring á tlf. 210819

KØMUR TIL LEIGU
Skalt tú í skúla í Havn næsta skúlaár og vilt búgva í royk- og rúsfríum umhvørvi nær studentaskúlanum ella maskinskúlanum, so skriva til:
bill.mrk. 370840

MØBLERAÐ ÍBÚÐ
Íbúð í Keypmannahavn til framleigu í tíðarskeiðnum 01.06. til 01.08.. Beint við Ríkisjúkrahúsið. Vælegnað til barn.
Tlf. 312022 ella 0045 40745944

SKÁLAVÍK
Nýggjari frítíðarhús til leigu, sum standa væl fyri við útsýni yvir bygdina og víkina. Allir vanligir hentleikar eru í húsinum, sum eisini hava sentralhita.
Tlf. 311197
Heimasíða: http://heima.olivant.fo/~debes
E-postur: debes@post.olivant.fo

SUMMARFRÍTÍÐ Í KBH.
2 ver. íbúð mitt í Keypmannahavn til leigu frá 15.7. til 4.8.
Tlf. 33248481

SUMMARHÚS
í Kunoy til leigu.
Ring 456247, best millum kl. 17-18

SUMMARHÚS Í SKÁLAVÍK
til leigu.
Tlf. 315712 eftir kl. 17

SUMMARHÚS TIL LEIGU
Stór, nýggj summarhús í Dronningmølle á Norðsælandi, uml. 7 km til Gilleleje og uml. 1 tími at koyra til Keypmannahavnar sentrum. Í húsinum eru allir nútímans hentleikar, 8 svoplass til vaksin, 2 barnasengur, seingjartoy o.a. Verða útleigað frá uml. 5. aug. og fram til fólk, ið fara væl um.
Tlf. 455835, e. kl. 18

TIL GJÁAR AT FERÐAST
Eini eldri summarhús til leigu við Gjógv, við øllum vanligum hentleikum, so sum vaskimaskina og sjónvarp.
Tlf. 421305 ella 210305

TIL GJÁAR AT FERÐAST
Eini eldri summarhús til leigu við Gjógv, við øllum vanligum hentleikum, so sum vaskimaskina og sjónvarp.
Tlf. 421305 ella 210305

TIL LEIGU
Stór íbúð til leigu í Havn til friðarlig hjún frá 1. juli. Depositum 15.000 kr.
Leiga 5.000 kr.
Tlf. & fax 0045 86 12 55 54

TVØROYRI
Skulu tygum til Suðuroyar og vilja búgva væl, so eru hús í miðbýnum til leigu vikuskifti ella longri tíð. Sera vakurt útsýni yvir Tvøroyrarfjørð.
Tlf. 312205 - 288205

UM HÓSKANDI
boð fæst, seldi eg hús á Glyvrum, við 2 íbúðum.
Ring 22133647 eftir kl. 16

YNSKIST
Íbúð ella kamar ynskist til ungan, friðarligan mann.
Tlf. 361782

YNSKIST
Íbúð ella kamar ynskist til leigu í Havn til lærara frá 1. juni í eitt ár, ikki roykjari.
Tlf. 424077

YNSKIST
Høli til teknistovu ynskist til leigu í Havn frá 1. juni til designara.
Tlf. 424077

Bøkur

LADEMANN
heimsatlas, stórt og vælhildið, til søluvi fyri 150 kr.
Tlf. 444384

MASKINBINDIBÓK
til søluvi fyri 50 kr.
Tlf. 444384

VOLVO-HONDBÓK
(gør det selv) til 240-seriuna til søluvi fyri 150 kr.
Tlf. 444384

Dýr

DUNNUUNGAR
Nakrir dunnuungar til søluvi.
Tlf. 441252

FITTIR HUNDAHVØLPAR
fáast við at avheinta.
Tlf. 441581
eftir kl. 18

FITTUR
reyðbrúnur hundahvølpur, hvítur um hálsin, 8 vikur gamal, undan lítlari tík og lítlum hundi, letist til djóravin.
Tlf. 441833
aftaná kl. 18

FUGLABÚR
til søluvi fyri 300 kr.
Tlf. 316613

HALLÓ HALLÓ
Eg eri ein sera fittur og reinligur kettlingur, ið manglar eitt heim.
Ring 423529
ella 210971
bert djóravinir

HUNDAHVØLPAR FÁAST
mamman er blandað springer spaniel/colli. Bert til djóravinir.
Tlf. 315811

HUNDAHVØLPUR
Svartur, spælisjúkur hundahvølpur undan barnavinarligari tík, tíkin er blandað collie, kann latast djóravini.
Tlf. 423551

HUNDAHVØLPUR
undan góðsintari puddiltík verður latin djóravinum.
Tlf. 455786, e. kl. 17

KANINUNGAR
Fittir kaninungar til søluvi.
Tlf. 311861, Bjørg

KETTLINGAR
verða latnir djóravinum.
Tlf. 457654 - 217430

SEYÐAHUNDAHVØLPAR
til søluvi.
Tlf. 213620

TIL SØLU
7 ára gomul ryssa til søluvi.
Tlf. 332245
ella 282245

UNDULÁTAR
til søluvi.
Tlf. 314434

Fundir

ALMENNUR
fyrilestur við Sepidh barnalækna verður í felagshøllini á Klaksvíkar sjúkrahúsi 8. juni kl. 19.00.
Føroya Astma/Allergifelag

ALMENNUR FYRILESTUR
við kostráðgevara verður á Hotel Tórshavnar Sjómansheim leygardagin 27. mai kl. 14.30.
Føroya Astma/Allergifelag

LIMAFUNDUR
verður í Mettustovu mánakvøldið 29. mai kl. 20. Evni: Frágreiðing frá KSF-fundinum.
Kvinnufelagið

Húsarhaldstól

KOMFÝRUR TIL SØLU
Hvítur komfýrur í sera góðum standi til søluvi fyri 2.000 kr.
Tlf. 219994

KØLISKÁP
bíliga til søluvi.
Tlf. 449901 aftaná kl. 18

TIL SØLU
5 mðr. gomul Zanussi vaskimaskina, 4.000 kr. Vestfrost fyrstiboks, 300 litrar, 3.000 kr. Nýprísur 10.000 kr.
Tlf. 373416 - 281475

UPPVASKIMASKINA TIL SØLU
Hvít uppvaskimaskina í sera góðum standi til søluvi fyri 2.000 kr.
Tlf. 219994

VASKIMASKINA TIL SØLU
Lítið brúkt 1/2 ára gomul Zanussi vaskimaskina til søluvi vegna flyting fyri kr. 3.000,-
Tlf. 284609

VÆLHILDIN VASKIMASKINA
av merkinum Miele de Luxe - electronis W 761 til søluvi.
Tlf. 331011
ella 311015

Innbúgv

EIN IDE GLASHURÐ
innhurð 90 cm. breið, til søluvi fyri 1/2 prís.
Ring 310117 aftaná kl. 17

GÓÐ MADRASS
ynskist til keyps, stødd 75 x 190.
Tlf. 314089

HORNASOFA
Velour hornasofa + 2 stólar (sprøklut, so sum blá, pink, svørt og lilla) verður selt fyri 1.000 kr.
Tlf. 310767
ella 217406

HVÍTT SOFABORÐ
við glasplátu í miðjuni 110 cm x 110 cm. til søluvi fyri 1.000 kr.
Tlf. 317343 aftaná kl. 16

INNBÚGV
Leðurstólur v/ skamli, 2 og 3 pers. sofur úr svørtum leðri, sum nýtt, til søluvi fyri 3.800 kr.
Tlf. 422230

INNBÚGV BÍLIGA TIL SØLU
Tvær 2 pers. sofur úr bókarviði, sum nýggjar, 2.000 kr. Sofaborð úr bókarviði, 400 kr. Fýra barberstólar v/ armleni, 400 kr. Eitt skáp hvítt skáp við skuffum, til barnakamar, 300 kr. Reyð kommoda til barnakamar, 50 kr. Runt marmor spísiborð (defekt) 100 kr. Hillar + hillaberarar, 200 kr. Foldihurð, myrkt træ við fylling, 350 cm breið, 500 kr.
Tlf. 312780,
Hilbert Dam

LEÐURSOFA
Ein brún leður trý-mansofa til søluvi fyri 500 kr.
Tlf. 316016

VEGNA FLYTING SELIST
Solarium (7 rør), B& G kaffistell hvítt (casablanca), barnaskriviborð, hvít kommoda, baðikar (nýtt), 2 box madrassir/ sengur.
Tlf. 315531